Viðmerkingar:

Samgongan raðfestir fólkaskúlan høgt

Tað er tí ikki rætt, tá ið Føroya Lærarafelag og ávísir andstøðupolitikarar føra fram, at landsstýrið ikki vil játta neyðuga peningin til nýggju fólkaskúlalógina. Tvørtur ímóti vísa tølini, at hetta landsstýrið hevur raðfest fólkaskúlan høgt, og tí er játtanin eisini økt munandi meiri, enn tað, nýggja fólkaskúlalógin hevur elvt til.



Sambært tingskipanini skal í almennu viðmerkingunum til lógaruppskot verða upplýst, hvør figgjarligur kostnaður stendst av uppskotinum.

Tað verður emtt sum sera álvarsligt, um ein landsstýrismaður gevur løgtinginum villleiðandi upplýsingar. Tí er í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins ásett, at landsstýrismaður kann verða revsaður, um hann gevur villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá ið løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

Tá ið landsstýrismaðurin Eilif Samuelsen legði nýggju fólkaskúlalógina fyri løgtingið, var hetta upplýst um fíggjarliga kostnaðin (løgtingstíðindi 1996, bl.s. 533):

Mesti meirkostnaður kemur at standast av forskúlaflokkum, smb. greinina um Forskúlaflokkur í lógaruppskotinum. Hesin meirkostnaður er mettur til o.u. 6 mill. krónur árliga, um so er, at allur árgangurin tekur ímóti hesum tilboði. Eitt sindur av meirkostnaði kann standast av trímæltum næmingum og verkætlanaruppgávunum í 9. og 10. flokkunum. Roknast má við, at nakað av eykaútreiðslum eisini fara at standast av øktari eftirútbúgving av lærarunum. Um breytatilboðini verða sett í verk, kunnu tey fara at kosta meir enn verandi undirvísing í 10. flokki, tí talan verður m.a. um næmingaflutning og møguligt samstarv við aðrar skúlaformar. Ringt er tó at áseta nakra upphædd, tí alt veldst um vavið. Skúlavegleiðaraskipanin verður mett at kosta einar 3-4 starvssetanir meira. Fólkaskúlaráðið fer at bera eitt sindur av meirkostnaði við sær. Annars verður ikki hildið, at verandi uppskot skuldi borið aðar øktar útreiðslur við sær

Bæði Lærarafelagið og Tórshavnar skúlaráð mettu, at meirkostnaðurin var nógv størri. Tí varð hesin spurningur gjølla viðgjordur undir nevndarviðgerðini í løgtinginum. Í løgtingstíðindi 1996, bl.s. 589, verður sagt *»Landsstýrismaðurin í skúlamálum hevur fyri nevndini upplýst, at talan verður í mesta lagi um 8,5 mió. í meirkostnaðin um árið, um uppskotið til fulnar verður framt í verki (sí hjálagda skjal frá landsstýrismanninum 14.05.97)«.*

Skjalið, mentanarnevndin vísir til, at hevur landsstýrismaðurin Eilif Samuelsen undirskrivað, og har er nærri útgreinað, hvussu nógv nýggja fólkaskúlalógin fer at kosta. Tað eru nevnd 6 øki, sum bera í sær meirkostnað. Av teimum 6 økjunum eru tað bara forskúlin (6,188 mió. kr.) og skúlavegleiðaraskipanin (3-4 ársverk) sum bera í sær, at fleiri lærarar skulu verða settir í starv.

Forskúlin er ikki settur í verk. Verður kostnaðurin fyri hann drigin frá, at meirkostnaðurin, sambært upplýsingunum hjá landsstýrismanninum Eilif Samuelsen, til restina av nýggju fólkaskúlalógini góðar 2 mió. kr.

Verður hugt at játtanini til fólkaskúlan, so e rhon økt nakað seinnu árini: Fra 1997 til 2000 er játtanin økt úr 133,5 mió. kr. til 161 mió. kr. tvs. 27,5 mió. ella yvir 20%. Nakað fer til lønar- og prísvøkstur og økt næmingatal, men eftir eru 10-12 mió. kr. Hetta er farið til KT, eftirútbúgving og at umflokka lærarar og leiðarar vegna nýggju fólkaskúlalógina. Sostatt er játtanin til fólkaskúlan økt nógv meiri, enn tað, sum sambært upplýsingum frá landsstýrismanninum Eilif Samuelsen, fór at standast av nýggju fólkaskúlalógini.

Fólkaskúlin er tí á ongan hátt skerdur, men hevur hetta landsstýrið tvørturímóti bøtt um teir fíggjarligu karmarnar hjá fólkaskúlanum.

Karsten Hansen,
landsstýrismaður

Hvør brýtur fólkaræðið niður

Tað er ikki eiti á, sum løgmaður nú leggur eftir okkum lærarum. Í viðtali við Sosialin ávarar hann um, at lærarar ætla at taka løgtingið av ræði og innføra anarkistisk viðurskifti.

Tað tykir mær, sum løgmaður roynir at venda eyguni á Føroya Fólki og harvið veljarunum burtur frá tí veruliga trupulleikanum, sum framvegis eitir eitt stívrent fíggjarmálastýri.

Hetta ger eisini gandakallurin, tá hann vísir síni gandakynstur fram og lumpar áskoðarnar til at trúgva upp á gandin. Í hesum førinum man neyvan nakar áskoðari ella áhoyrari lata seg lumpa .

Løgmaður veit væl, at tað eru fyrst og fremst lærararnir, sum læra og venja komandi veljarar at liva í einum demokratiskum samfelag, hvar tú ikki bert hevur ein meiriluta sum ræður, men hvar meirilutin eisini hevur fyrilit yvir fyri minnilutanum og virðir hansara rættindi.

Onki vilja lærarar kollrenna løgtingið, men beint tvørtur ímóti. Vit vilja virða og halda tær lógir, sum okkara hægsti mynduleiki hevur sett í gildið. Landsstýrið haraftur ímóti —við løgmanni á odda- vil ikki játtað tann pening, tað kostar at fylgja hesum lógum, so her kann ein og hvør síggja, hvør tað er, sum vil bróta lógina, og hvør ikki . At tosa um at seta lógina í gildið í pettum, kann bert uppfatast sum vánaligt skemt, og sjálvt um tað varð gjørt, álegði hon kortini meira arbeiðið á lærararnar. Veruleikin er: Lógin er sett í gildið í stigum, og seinasta stigið kemur í gildið næsta ár.

Eg havi annars altíð havt ein stóra virðing fyri løgmanni. Hann hevur verið ímyndin av siðiligheit, stillføri og ikki lopin fram av, men í hesum málinum haldi eg, hann er lopin so beint á bláman. Vónandi hjálpir onkur honum uppaftur og sigur honum sannleikan um ta nýggju skúlalógina.

Nógv hevur verið sagt og skrivað um henda fyrsta arbeiðsteðgin hjá lærarum. Tó er tað eitt sum eg sakni í hesi viðgerðini. Tað er umrøðan av lærarum, sum einasta samfelagsbólk,ið við lóg kann fáa álagt meira arbeiðið fyri somu løn, og tað merkir í veruleikanum ein lógarfestur lønarmissur. Allir aðrir bólkar í samfelagnum kunnu samráðast um arbeiðsviðurskiftini, men hetta nokta landsins hægstu myndugleikar okkum.- Hvør er tað tá , sum vil jarðleggja fólkaræðið og mannarættindini?

Og vil vóna, at myndugleikarnir taka seg saman og gera tað einasta rætta: -Játtið fólkaskúlanum meiri pening, so vit kunnu koma í gongd aftur sum skjótast og fullføra ta nýggju skúlalógina, børnum og ungdómi at gagni.

Páll Poulsen, tænastumannasettur lærari á 30. ári

Atfinningarsamur løgmaður

Vit lærarar hava nú verið í verkfalli í ein góðan mánað. Hesa tíðina hevur skúlagongdin hjá flestu næmingunum verið heldur svikalig og seinastu tíðina heilt út av lagi.

Tá ið ósemja er millum tveir partar, er torført hjá fólki, sum ikki hava nakað við trætuna at gera, at vita hvør hevur rætt, og hvørjum hildið skal verða við. Í so máta er hetta málið einki undantak, og at trætan er um so viðbrekið mál sum *tíð*, ger fløkjuna mestsum ómøguliga at greiða. Nógv fólk, ið halda seg vita, hava sagt sína hugsan, og nú hevur Føroya løgmaður eisini sagt nøkur "vísdómsorð".

Løgmaður ikki *tíð*

Læraraverkfallið er tíverri í skugganum av øðrum stórmáli. Samráðingarnar við danir eru á skránni, og verkfallið er tí sett nakað til viks, og tað er nú ikki so løgið. Tað er sjálvandi spell, halda vit, sum eru í verkfalli. Løgmaður er ógvuliga bundin av hesum samráðingum, og hevur tí helst ikki havt *tíð* at kunna seg um, hví Lærarafelagið er í verkfalli. Í staðin er hann farin upp í politiska kórið, sum bara dugir ein sang, "*6,5 % og øll verða glað*".

Heilt serlig støða

Vekfallið snýr seg ikki um løn, men um tíð, sum sjálvandi fer at kosta landskassanum nakað. Og at siga at henda tíðin ikki eigur at vera uppi í sáttmálasamráðing eru púra rætt. Sáttmálasamráðingar eiga at vera um løn, eftirløn, frítíð o.tl. Men tað er púra óhoyrt á t.d. privata arbeiðsmarknaðinum at siga við starvsfólk, at tey nú brádliga skulu loysa einar 10 nýggjar uppgávur, og tí arbeiða 5 tímar meira um vikuna, men lønin skal vera tann sama. Tað verður nú sagt við lærararnar, tí í nýggju fólkaskúlalógini eru fleiri nýggjar uppgávur,ið krevja meiri tíð. Starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum høvdu kanska gingið undir at arbeitt yvir, men tað kunnu lærarar jú ikki. Næmingarnir fáa frí um 3 tíðina, og tí kann ein lærari ikki undirvísa til kl. 5, hevði hann havt hug til tað.

Tí er einasta loysnin hjá okkum, nú vit hava fingið nógv meira at gera, at skarvað verður av aðrastaðni. Undirvísingartíðin má lækkast úr 27 tímum um vikuna. Hvussu langt niður undirvísingartíðin skal, er so tað, partarnir mugu samráðast um. Umframt sjálva undirvísingartíðina er so eisini spurningurin um t.d. savnsrøktina. Hetta arbeiðið hava lærarar higartil gjørt ókeypis. Her mugu lærarar so taka í egnan barm og viðganga, at sjálvgjørt er vælgjørt. Lærararnir kundu bara havt latið vera at tikið sær av t.d. smíðstovuni fyri einki. So hevði smíðstovan farið í hundarnar, og so kanska onkur fólkavaldur hevði vaknað. Tað ber bara ikki til hjá skapandi mennískjum at arbeiða í niðurslitnari stovu, og tað hava myndugleikarnir gjørt sær dælt av.

Anarki?

Um anarki verður í orðabókini m.a. sagt, at tað merkir stjórnarloysi. So aftur her hevur løgmaður púra rætt. Talan er um anarki, tí stjórnin - landstýrið og løgtingið ikki megna at útinna tað arbeiði, fólk hava latið teimum upp í hendi. Føroya Lærarafelag kann sjálvsagt ikki góðtaka, at sama lóg, sum sett er í gildi í Danmørk, og sum har gevur lærarunum 4 tímar í niðurskurði um vikuna, einki skal geva í Føroyum. Tað verður sagt um okkum føroyingar, at vit eru óførir, men máti skal nú vera við.

Føroya Lærarafelag tekur sjálvsagt ikki undir við anarkii, og ongum lærara dámar, at vit mugu berjast fyri lógini, sum vit gera. Lógin hevur fingið drúgva politiska viðgerð og er samtykt. Vit duga at síggja, at nýggja lógin er betri enn tann gamla, og vit vilja tí ikki hoyra talan um at fara aftur til gomlu fólkaskúlalógina.

Eitt líknilsi

Trætan kann berast saman við at keypa ein nýggjan bil upp á borg. Vit brúka bilin, sum okkum lystir, og hann roynist væl betur enn gamli bilurin, og í honum rúmast nógv fleiri enn í tí gamla. Men nú skal nýggi bilurin gjaldast, og tá er hugurin brádliga burtur. Kanska tann gamli, trongi bilurin nú ikki var so galin kortini. Hann kom so fram.

Sama kann sigast um gomlu fólkaskúlalógina, tí næmingarnir lærdu at lesa og skriva. Nógvir av hesum næmingunum eru eisini komnir langt, og ráða nú fyri borgum. Men nógvir duttu eisini burtur ímillum. Nýggja lógin byggir á gomlu lógina, men gagnar tí einstaka næminginum nógv betur. Sostatt skuldu nógv fleiri næmingar, bæði teir, sum eru væl fyri, og teir, sum eru ikki so væl fyri, fingið avbjóðingar, og kunnað menst og seinni styrkt samfelagið.

Framtíðin

Politikarar skulu tryggja góð viðurskifti í framtíðini. Vit mugu ikki enda aftur í 80-árunum, sigur løgmaður. Vit mugu vóna, at 80-árini lærdu okkum okkurt, og at vit ikki gera somu mistøk aftur. Men tað er tó løgið, at vit kunnu avskriva lán hjá rækjutrolarum fyri einar 50 milliónir, men vit kunnu ikki gjalda fyri góðan skúla, tí tað er at fara aftur í 80-árini!

Framtíðin er rækjutrolarar, aling og kt-tøkni, men mest av øllum er framtíðin ungdómurin. Skúlin skal tryggja øllum hesum ungu mennandi og gott umhvørvi. Líkamikið hvussu viðurskiftini eru heima, og hvussu evnini eru. Tey virði, sum tá kunnu koma burtur úr, kunnu als ikki verða borin saman við fiskastovnar ella annað. Tí mugu menn sum Anfinn Kallsberg fáast at skilja, at tað eisini er her, íløgurnar skulu verða gjørdar.

Hetta skúlaárið er nú av álvara farið at halla, og eg vóni, at vit kunnu fara undir nýggja skúlaárið og vita, at nýggja fólkaskúlalógin er fingin undir land við øllum tí, sum hon krevur. Eingin sigur, at alt skal fáast at virka beinanvegin, men tíðarfreist skal verða sett á nú. Fyrrenn tað er gjørt, er ikki grundarlag at fara aftur í skúla.

Magnus Tausen
sáttmálasettur lærari

Viðmerkingar:

Ikki ein politiskur spurningur

Góðu føroyingar

Royn einaferð at seta teg niður, gloym alt sum eitur fullveldi, sambandsflokkur, vælferðarsamfelag, javnaðarflokkur, tjóðveldisflokkur og so víðari. Hygg út fígjøgnum vindeygað, so sært tú fjøll, hav, regn, fólk, hús, bilar. Hugsa teg nú væl um, hvør ert tú? Hvaðani kemur tú frá? Finn eitt orð, sum sigur nakað um alt hetta, tú sært uttanfyri: Føroyar!

Hevur tú ta kenslu, at tú hevur ábyrgd av tær sjálvum? Er tað ikki ein góð kensla at hava? At tú, um tú ætlar tær at gera okkurt, so nýtist tær ikki at hava undirskrift og loyvi frá foreldrum ella verja? Hevði tað á sama hátt ikki verið deiligt at kunnað havt hesa kenslu yvir fyri staðnum tú ert frá? Hevði tað t.d. hjá javnaðarmanninum ikki verið deiligt at vita sær, at endiliga, endiliga kann eg byrja at stýra hesum landinum sum eitt land og ikki bara ein landspart. Endiliga kann eg fullføra mína ætlan um vælferðarsamfelag, nú skal eg vísa, hvat eitt vælferðarsamfelag er, nú skulu fólk síggja. Og tað sama hjá t.d. sambandsmanninum, endiliga kann eg vera ein rættur liberalistur, so at hetta, sum nú er blivið eitt land, kann fáa eina fría kapping, so at prísir og dygd verða betri, og uppaftur betri er, at eg nú kann geva loyvi til handilssamarbeiði við onnur lond heilt einsamallur, uttan at onkur niðri í Danmark sigur at eg ikki sleppi. Eg ivist onga løtu í, at hetta er ein dreymur, ein dreymur sum tað ber til at føra út í lív. Hetta handlar ikki um at vera sambands-, javnaðar-, tjóðveldis-, sjálvstýris, miðflokka- ella fólkafloksfólk. Hetta handlar um at ásanna, at ein føðing fór ígongd fyri nógvum harrans árum síðani og, at vit nú eru komin so langt, at barnið ikki kann verða í búkinum longur, tað má út. Tað keðiliga við hesum spurningi um fullveldi, loysing, sjálvstýri, (ja hvussu skal barnið eita?), er tað, at hann er har, og at hann er politiskur. Hetta átti ikki at verið ein spurningur, hetta átti at verið nakað natúrligt, sum vit áttu at verið samd í. Eitt er at vera ósamd um høgra og vinstra politikk, sosialismu, liberalismu osfr., men at vera ósamd um, at vilja hava fult ræði á landi sínum er ónatúrligt. Tað, sum vit ikki hava ásannað enn, er at tað býr nakað í okkum øllum, sum sigur tað, at vit eru føroyingar, og at vit búgva í Føroyum, sum TÍVERRI ikki er eitt ordiligt land enn, men sum vit, um vit standa saman um hetta eina málið, kunnu fáa til eitt land, eitt land, har føroyingar búgva, práta, arbeiða, mála, syngja og stýra. Har tað er føroyingurin, sum sjálvur kann siga, um hann hevur hug til at samarbeiða við handan handilsmannin úr Kina osfr.

Tað sigur seg sjálvt, at fólk eru ósamd um ymiskt, men hetta átti at verið eitt mál, sum vit vóru samd um. Tí haldi eg, at tað er harmiligt, at eftir at okkara landsstýrisfólk hava verið niðri og roynt at fingið eina góða avtalu við Danmark um hvussu vit skipa okkum sum egið land, og har okkara umboð vera sera illa viðfarin, at hesi landsstýrisfólk tá ið tey koma heim aftur til tað fólk, sum tey royna at tryggja eitt frælst samfelag, fáa eina lortaspann afturat omanyvir seg. Sjálvandi eiga vit at stuðla tey, ið vit hava valt at stýra okkara »land«, og vóna at tað gongur teimum sum frægast. Hava vit misskilt okkurt, hetta er framtíðin hjá okkum øllum, tað snýr seg um. Tað sigur seg sjálvt, at um vit loysa, so mugu vit hava eina so góða avtalu við Danmark sum gjørligt, líkamikið um vit eru sambands-, javnaðar-, sjálvstýris-, miðflokka-, fólkafloks- ella tjóðveldisfólk. Tað eru altso ikki bara samgongufólk,ið koma at líða undir avleiðingunum av tí avtaluni, sum tað endar við, líka sum tað heldur ikki eru bara tey, ið fáa gleði av henni.

Eg haldi, at tú sum føroyingur má fara djypri inn í teg sjálvan, seg teg niður nú eitt kvøldið, gang ein túr, hugsa teg um, kanska tú hevur verið og ferðast onkuntíð, hugsa um hvat tú sást, og hvat tú sært nú, hugsa um, hvat tú virðir hægri: fíggjarligan tryggleika (kanska ikki eingang tað) og vitanina um at tú nassar av einum øðrum landi ella vitanina um, at tað nú eru tú og føroyingar, sum stýra hesum landinum, at vit hava møguleikan til at gera hetta landið til eitt suverent (sum javnaðarmaðurin segði) vælferðarsamfelag. Hugsa um málið, hitt føroyska málið, hvat er hetta vit tosa? Vit eru 45.000 fólk, og vit hava klárað at varðveitt eitt mál í so langa tíð, er tað ikki ótrúligt? Tað sigur eitt sindur um, hvussu sterkur okkara samleiki er. Hugsa um, tá tú fert út at ferðast, og tollarin fyrst pyr: »Where are you from?« Tú svarar »The Faroe Islands« og hann hyggur eitt sindur undrandi í passið hjá tær og sigur: »ahhh…Denmark«. Royn at ímynda tær, at hann sigur: »hmm…The Faroe Islands, where are they?« og tú byrjar at greiða frá og endiligt kanst tú svara »nei« til spurningin um tað er »dependent« av nøkrum øðrum landi. Hugsa eisini um teg sjálvan, royn at finna samleika tín. Eg veit, at tað ikki bret eru tjóðveldis-, fólkafloks- og sjálvstýrisfólk, ið identifisera seg sum føroyingar og vilja, at Føroyar, teirra land, skal gerast eitt egið land, tað er bara óheppi hjá hinum flokkunum, at tað skuldi verða hesir flokkar, sum tóku seg saman at gera nakað við tað. Eg skilji tað væl – tað er natúrligt – tað er bara tað, at hetta er eitt ov stórt mál til bara at lata fara framvið av (um eg kann loyva mær) øvundsjúku. Tí er tað av stórum týdningi, at fólk hugsa seg væl um, og lata allan flokspolitikk liggja í skuffuni, áðrenn tey taka eitt val um framtíðina hjá Føroyum. Eisini hetta við, at Føroyar fara fallit, og at tað fer ikki at bera til at liva her eftir loysing, hetta er so púra burturvið at siga. Um vit so fáa eina skiftistíð upp á 1 dag, so fara allar Føroyar ikki at hvørva. Halda fólk, at fjøllini søkka niður í havið, og at húsini mystiskt hvørva? Tað ber sjálvandi til at liva víðari. Hvør nevndi avleiðingar? Sjálvandi fer tað at hava avleiðingar, positivar sum negativar, hetta er eisini tað, sum ger okkum til fólk. Tað at vit gleðast við góðar tíðir og stríðast undir ringum tíðum, fyri at merkja tað, at tú livir og fyir at merkja hendan viljan til lívið, krevur tað jú eisini, at vit royna nýggj, vandamikil, spennandi og uppbyggjandi ting. Tað er tað,ið ger okkum til menniskjur. Latum okkum standa saman og fáa hetta landið upp at koyra sum aldrin áður, saman ber alt til!!!

Nei, hetta verður ov langdrigið, eg kann blíva við, at royna at sannføra um, at fullveldið er rætta leiðin, men sum eg áður havi sagt, so hevur tað nakað við teg sjálvan at gera, ikki við hvønn flokk tú nú einaferð valdi á síðsta vali ella hvat familjan og vinirnir velja og halda. Tað er tú, sum skalt trúgva upp á teg sjálvan, taka ræði á landi tínum og gera tað, ið tú innast inni kennir á tær er rætt, ikki bert fyri teg, men eisini fyri tínir eftirkomarir. Ímynda tær tá ommu og abbabørnini fara at práta um hvussu djørv/djarvur tú vart! Hygg einaferð í søgubókurnar, hvør er tað sum er hetjan? Jú, tað er sum oftast tann, ið stríðist fyri frælsinum.

Hetta er ein persónligur spurningur so tað forslær. Og TÚ ert ein av teim heldigu, ið sleppur at hava ávirkan á hann. Tí er tað av alstórum týdningi, at tú hugsar teg væl um, áðrenn tú tekru støðu til framtíð Føroya.

Vinarliga
Elisabeth Skarðhamar Olsen, ein føroyingur

Konfirmantar í Hósvíkar kirkju pálmasunnudag 16. apríl

Úr Hósvík:
Ása Hammershaimb Christiansen
Rógvi Klæmint Djurhuus Clementsen
Heri Djurhuus
Hans Petur Hansen
Herman Bogi Jatvarðsson Hermansen
Maibritt Mortensen
Elsa Maria Magnusardóttir Olsen

Úr Hvalvík:
Páll Hansen
Elisabeth Durhild Jacobsen
Jákubina Maria Jacobsen
Walther Olsen

Úr Streymnesi:
Elisa Abrahamsen
Birita Maria Joensen

Úr Saksun:
Marita Svartá

Av Langasandi
Heidi Højsted Hansen
Jóhanna Maria Hansen

Úr Tjørnuvík:
Dagmar Andreasen

Ráðgevingin fyri Føroyingar í Danmark

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark veitir ráð og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.

Upplatingartíðir: má.tý. hó. kl. 11.30–15.30, mik. kl. 14.00–18.00.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark,
Vesterbrogade 17 A,
1620 Kbh. V,

Føroyingar í Noregi

E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða:
http://www.norden.no/foroyar

Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Óslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Vika 14 – 8. apríl

Jokaratal: **9-1-9-1-8-1-1**

7 røtt:	**Eingin vinnari**
6 aftastu røtt:	**524.222,- kr.**
5 aftastu røtt:	**18.105,- kr.**
4 aftastu røtt:	**2.818- kr.**
3 aftastu røtt:	**268,- kr.**
2 aftastu røtt:	**51,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

DUSINO

Vika 14 – 9. apríl

Vinnaratøl: **02 - 03 - 04 - 08 - 09 - 13 - 16 - 17 - 18 - 19 - 20 - 22**

12 í sama punti:	**Eingin vinnari**
11 í sama punti:	**2.291,- kr.**
10 í sama punti:	**111,- kr.**
9 í sama punti:	**25,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS 13 úrslit
Vika 14
8.–10. apríl

1. Bradford–Southampton	2
2. Leicester–Everton	X
3. Sunderland–Wimbledon	1
4. Watford–Derby	X
5. Barnsley–West Bromwich	X
6. Bolton–Walsall	1
7. Huddersfield–Birmingham	X
8. Ipswich–Port Vale	1
9. Manchester C.–Crewe	1
10. Nottingham F.–Charlton	X
11. Portsmouth–Norwich	1
12. Sheffield U.–Grimsby	X
13. Wolverhampton–Blackburn	1

Prognosa

13 røtt:	**23.600,- kr.**
12 røtt:	**664,- kr.**
11 røtt:	**144,- kr.**
10 røtt:	**51,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS 12 úrslit
Vika 14
8.–10. apríl

1. AaB–Lyngby FC	X
2. AB–Herfølge	1
3. FC København–Esbjerg	1
4. Silkeborg–OB	1
5. Viborg–Brøndby	X
6. Farum–Randers Freja	1
7. Fredericia–Horsens	1
8. Fremad Amager–Haderslev	2
9. Svendborg–Dalum	2
10. Hjørring–Roskilde	1
11. Holstebro–HIK	2
12. Skive–Holbæk	1

Prognosa

12 røtt:	**26.724,- kr.**
11 røtt:	**966,- kr.**
10 røtt:	**108,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VALUTAKURSIR

		10.04.00	Ultimo mars
USA	**Dollarar**	778,0700	778,9500
Bretland	**Pund**	1230,9500	1243,2800
Týskland	**Markur**	380,8400	380,7100
Svøriki	**Króna**	89,9600	89,7900
Noreg	**Króna**	91,5000	91,9900
Frakland	**Frankur**	113,5500	113,5100
Belgia	**Frankur**	18,4640	18,4580
Sveits	**Frankur**	473,7900	467,8900
Holland	**Gyllin**	338,0000	337,8800
Italia	**Liri**	0,3847	0,3846
Finnland	**Markur**	125,2700	125,2300
Ísland	**Króna**	10,5700	10,5700
Eysturríki	**Skillingur**	54,1300	54,1120
Spania	**Pesetas**	4,4760	4,4750
Portugal	**Escudos**	3,7150	3,7140
Kanada	**Dollari**	533,7900	535,4500
Grikkaland	**Drakmur**	2,2260	2,2250
Japan	**Yen**	3,7168	7,4119
Írland	**Pund**	945,7600	945,4500
	Evra	744,8500	744,6000

FØROYA SPARIKASSI

Vika 14 – 8. apríl

Vinnaratøl: **05 - 10 - 21 - 27 - 29 - 34 - 35**
Eykatøl: **06 - 07**

7 vinnaratøl:	**2.116.214,- kr.**
6 vinnarat.+1 eykat.:	**69.527,- kr.**
6 vinnaratøl:	**4.328,- kr.**
5 vinnaratøl:	**148,- kr.**
4 vinnaratøl:	**34,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

sosialurin
Altid fyrst við
www.sosialurin.fo